byggja á Tórshavnar Skipasmiðju. Eitt serligt minni er, tá ið teir royndartúrin sigldu so nær inn at bygdini Hvítanes, sum til bar, og øll fløggini inni á landi í skundi vórðu drigin á stong. Øll í ættini føldu seg so nær knýtta at bygdini, har tey vuksu upp sum børn, og hetta var ein kensluborin løta.

Hvítanes var upprunaliga eitt frystilínuskip. Seinni varð hann umbygdur til trolara og gjørdist eitt av fyrstu føroysku skipunum á rækjuveiðu fyrst í 1970-unum.

Petur og Signhild fingu hesi børnini:

**1**. Dánjal Pauli Danielsen, f. 20.5. 1937, giftist við Jórun Jacobsen, ættað úr Hvalvík, og tey búsettust í Havn. Hann førdi Hvítanes ta tíðina, skipið var í flotanum. Hann doyði 30.11.1994.

**2.** Regin Danielsen f. 19.1. 1939, giftist vit Astu Vang úr Kaldbak. Tey búsettust í Havn.

**3**. Jana f. 6.7.1940, giftist við Dánjal Petur Nielsen úr Sandavági. Búgva í Havn.

**4**. Petur Pauli Danielsen f. 3.10. 1948, giftur við Esther Andreassen úr Havn, har tey eisini búsettust. Petur doyði 03.05.1995.

**C. Sigurd Danielsen**, f. 9.7.1917. Doyði 23.10 2002. Kona hansara var Naena f. Mikkelsen f. 5.3. 1927 í Syðrugøtu, dóttir Poul Amaliel Mikkelsen f. 17.9.1890 í Syðrugøtu og Perlinu f. Højgaard 2.4.1890 í Rituvík. Tey búsettust í Syðrugøtu.

Sigurd fór eisini ungur til skips. Hann var fyrst tvey ár við William Martin. Síðan fór hann við Isabellu, ið Petur beiggi hansara hevði fingið at føra. Hann fór niður til Danmarkar at læra til bakara og kondittara. Staddur í Danmark hersettu týskarar Danmark í 1940, og hann slapp ikki heim aftur fyrr enn bardagin var av. Tá arbeiddi hann hjá Frants Restorff sum bakari, til hann fór at fáast við handilsvirksemi. Naena og Sigurd giftist í 1948 og búsettust í Havn.

Tey fingu børnini:

**1**. Ingibjørg Rasmussen, f. 27.10 1950 í Havn. Giftist við Jónsvein Rasmussen úr Oyndarfirði. Tey búsettust á Hvítanesi.

**2**. Poul f. 16.7. 1952 í Havn. Giftur við Karlu Joensen úr Oyndarfirði. Búsett á Stykkinum.

**3**. Per Danielsen, f. 4.1.1959 í Havn. Giftur við Ingunn Andreassen úr Havn. Búgva í Havn.

**D. Poula Maria Danielsen** f. 22.7. 1921 á Hvítanesi. Gift við Peter McGavin, ættaður úr Hull í Onglandi.

Hann var við í Dunkerque í 1940, tá ið bretar hopaðu undan týska herinum. Hann var særdur og kom til Føroyar sum hermaður, tá ið hann var komin fyri seg aftur. Peter fall so væl til í Føroyum, at hann vildi búseta seg her. Honum dámdi væl at rógva út við báti sínum Kathleen. Tey búsettust í Havn. Peter var eisini í fleir ár nevndarlimur í Havnar Arbeiðsmannafelag.

Børn teirra eru Kathleen og Dora Mc Gavin.

**E. Hans Pauli Danielsen** f. 24.10 1923 á Hvítanesi, giftist við Petru f. Mikkelsen 15.8.1929 í Syðrugøtu. Er systir Naenu, sum var gift við Sigurd, beiggja Hans Paula. Hans Pauli fór ungur til skips. Í bardagaárunum sigldi hann við Poppy fyri enska hervaldið. Hann var eina tíð undir krígnum við danska fiskiskipinum Vestland saman við Johan Norðfoss, sum hevur greitt frá hesi sigling í Miðvikuni.

Síðan sigldi hann við Johan í Hoyvík. Tá ið hann gavst at sigla koyrdi Hans Pauli lastbil hjá Jón Hansen. Hans Pauli 8.1. doyði 1996.

Børnini hjá Petru og Hans Paula eru:

**1**. Inga Dam, f. 10.2.1960. Er gift við Signar Dam av Norðskála. Tey búgva í Havn.

**2**. Páll Eli Danielsen f. 17.9.1962 í Havn.

**3**. Dania, f. 1.1.1968 gift við Bárður úr Baianstovu úr Havn, og her búgva tey eisini.

Hjá Dánjal og Ingun vaks eisini upp Sofus Joensen (1932-2003) sum var bróðursonur Ingu. Var gift við Gunnvør.

## Elisabeth Poulina Sofía Danielsen

Poulina var fødd 7.7. 1889. Hon giftist við Jósef Djurhuus f. 4.8.1866, deyður 3-7-1934. Tey búðu Innan Glyvur.

Poulina fór at halda hús hjá Jósef, ið hevði mist konuna í 1922 og sat eftir við trimum smádreingjum.

18. februar 1925 giftust Jósef og Poulina og bleiv hon dreingjunum í móður stað. Sjálvi fingu tey fýra synir saman. Hetta var um ta tíðina, tá ið tuberklarnir herjaðu í Føroyum. Jósef gjørdist sjúkur og mátti á bróstsjúkrahúsið, har hann doyði longu í 1934, 47 ára gamal. Tvey ár frammanundan høvdu tey mist elsta sonin hjá Jósef við fyrru giftu Poul Johannes f. 19.11.1915. Hann gekk burtur við Immanuel í 1932 saman við 18 øðrum monnum. Hetta var ein døpur tíð hjá Poulinu. Tann 11.1. 1936 doyði næstelsti sonur Jósefs í fyrru giftu. Hann bleiv sjúkur av teim herviligu meslinginum frá meslingagrindini í Gøtu 1935 og nógv fólk doyði. Bert hin yngsti av teimum trimum synunum hjá Jósefi í fyrru giftu Andrew Djurhuus f. 3.4.1920 rakk ein vanligan høgan aldur. Hann giftist við Hervør f. Danielsen úr Húsavík. Tey búsettust í Havn. Her kann vera skoytt uppí, at Poulina var vinkona Linu, sum var gift við Daniel J. Danielsen, sum millum annað var trúboðari í Kongo 1901-1903. Tær vóru komnar at kennast á Viðareiði, har Poulina tænti, og har Lina kom nógv í samband við trúboðaravirkið hjá manninum. Vit hava havt eina røð í Miðvikuni um tey bæði. Poulina er helst seinasta fólk í Føroyum, sum Lina hevði samband við. Tískil kundi Hervør, verdóttirin, geva eitt heilt fitt íkast til hesa røð.

Poulina fall ikki í fátt. Hon hevði ta klettafastu trúgv, at tann Harri, sum hon hevði sett sítt álit á, fór at hava umsorgan fyri teimum.

Millum annað róði hon inn á Skála og fekk saltfisk frá handilsvirkinum hjá Absalon Jacobsen at turka. Fiskin flutti hon heim til sín sjálvs, vaskaði og turkaði hann, og so róði hon inn aftur á Skála við tí turkaða fiskinum. So kundi hon keypa sær vørur fyri lønina og taka tær við sær í bátin heim aftur.

Í bókini "At loysa úr lagdi" skrivar Oluf Djurhuus um Poulinu, at hon legði ikki árarnar inn. Hon tók so mikið dyggiligari á og væl royndist. Dreingirnir komu undan í øllum góðum. Hon megnaði at geva teimum eitt gott og gudsóttandi heim. Eitt heim, har Oluf hevði havt nógvar góðar løtur.

Poulina doyði 2.5. 1981, 91 ára gomul.

Børnini hjá Poulinu og Jósef vóru hesi:

**1**. John Djurhuus f. 17.12.1925, giftist við Edith Pedersen frá Thisted. Búsettust í Keypmannahavn.

**2**. Berint Djurhuus, f. 16.5.1927, giftist við Sáru Christoffersen frá Julianehåb. Tey búsettust í Nanortalik.

**3**. Wensil Djurhuus f. 6.7.1929. Giftist við Sunnivu Djurhuus úr Syðradali í Streymoy. Tey búsettust í Havn.

**4**. Emil Djurhuus, f. 8.5.1938, ógiftur. Hann húsaðist saman við mammuni Innan Glyvur til hon doyði 2.5. 1981.

Aftaná nýggjár verða tvær Miðvikur afturat um Hvítanes, serliga um Dánjal á Hvítanesi (1886-1983).

***Komandi partur***

*Í trimum komandi Miðvikum verða endurgivnar dagbøkurnar hjá Petur Alberg fyri 1900 og 1901*



*Poulina, saman við elstu børnum í næsta ættarliðnum, Peda, Hilmar og Bodil*



*Døtur Jensinu: Helga, Bodil, Petrea*



*Gomul mynd av Hvítanesi. Er tikin norðanfyri húsini Niðri í Túni í ein úsynning*

Sosialurin